



Kristian Dahl úr Havn til arbeiðis á politistøðini í Nuuk.

Mynd Jan Müller

partur verður bygdur einar tveir kilometrar frá býnum. Har eru bygdir einir 80 nýggir íbúðarblokkar og fleiri koma aftrat. Grønlendingar konsentrera seg um Nuuk eins og føroyingar fara til Havnar, har meira arbeiði og útbúgvingarmøguleikar eru.

Nógvir av teimum gomlu bygningunum, sum eru bygdir í 60- og 70-unum eru og verða tiknir niður og nýtt bygt ístaðin. Summir teirra eru illa farnir og vornir tað reina slumm. Tað, sum verður bygt nú, er nútímans og vælgjørt. Fyrr varð bygt í fáum hæddum men við longum gongum, har nógv fólk búgva tætt saman. Nú verður bygt meira upp eftir og tí verður sosiala umhvørvið heilt øðrvísi.

Tá fólk búgva í smáum íbúðum í blokkum og nógv fólk eru stúvað saman, so gevur tað sosialar trupulleikar. Fólk liva ov tætt upp at hvørjum øðrum, og tað skapar konfliktir.

Tað er annars ringt at sleppa undan blokkbyggingini og gera tað øðrvísi, tí tað er ikki pláss til at byggja alla staðni. Plássið er sera avmarkað, og tí verða fá vanlig sethús bygd.

Nú Kristian er við at leggja seinastu hond á sína arbeiðstíð í Grønlandi sannar hann, at Grønland er eitt ótrúliga vakurt og stórbært land og vil hann mæla øllum føroyingum til at fara til Grønlands um ikki júst at arbeiða at vitja sum ferðafólk.

- Tað er vakurt í Føroyum, men tað er tað so sanniliga eisini í Grønlandi, her er alt bara so nógv størri, so eg fari at royna at koma yviraftur einaferð í framtíðini sigur Kristian Dahl við Sosialin.

*jan@sosialurin.fo*




Kristian uttanfyri politistøðina í Nuuk

Mynd Jan Müller